# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– McCain er lopin framav í sínum lýsingum og hevur sagt ymiskt um Barrack Obama, sum ikki er satt*

*(Karl Rove)*

# Kavbáturin var fermdur við sjey tonsum av rúsevni

**Smuglarakavbáturin, sum amerikanska sjóverjan kom fram á, var útgjørdur við øllum nútímans tólum**



*Sjóverjan fann sjey tons av kokaini í kavbátinum (Mynd: US Coast Guard)*

Amerikanska sjóverjan fekk um vikuskiftið boð um, at eitt flogfar hevði sæð eitt far, sum kaavaði av og á, men sum kortini ikki líktist einum vanligum kavbáti. Avgjørt varð, at sjóverjuskipið USS McIneney skuldi senda tveir skjóttgangandi bátar eftir tí heldur løgna farinum, sum var staddur í Kyrrahavinum einar 56 fjórðingar úr strondini í Guatemala.

Fýra mans vóru við kavbátinum, sum teir royndu at søkkja, tá teir fingu eyga á bátarnar hjá sjóverjuni. Tað miseydnaðist, og teir fýra menninir góvu seg yvir til sjóverjuna. Umborð fann sjóverjan sjey tons av rúsevninum kokain.

Amerikanska sjóverjan sigur, at rúsevnasmuglararnir brúka av og á eftirgjørdar kavbátar. Báturin, sum sjóverjan tók um vikuskiftið, var 59 føtur langur og hevði alla nútímans siglingar- og samskiftisútgerð. Hann hevði so mikið stórar oljutangar, at hann hevði kunnað siglt úr Suðuramerika til San Diego í Kalifornia uttan at bunkra á vegnum, sigur sjóverjan.

# Ike oyðilegði fleiri oljupallar

**Kanningar hava víst, at ódnin Ike oyðilegði minst tíggju oljupallar í Meksikoflógvanum**



*Skaðin á oljuútbúnaðin kann elva til benzintrot her í Texas (Mynd: Polfoto)*

Umframt teir umleið tíggju oljupallarnar hevur ódnin oyðilagt nakrar olju- og gassleiðingar í flógvaøkinum, skrivar AP úr Houston. Oljufeløgini siga kortini, at tað er væl sloppið, tá hugsað verður um, at tað eru ikki færri enn 3.800 oljupallar í Meksikoflógvanum, harav meiri enn 700 eru fullmannaðir.

Ike gjørdi heldur ikki so stóran skaða á oljuútbúnaðin sum ódnirnar Katrina og Rita, tí tær oyðiløgdui 108 oljupallar, tá tær gjørdu um seg í flógvanum.

Enn er ov tíðliga at siga, um avleiðingarnar av Ike fáa nakra ávirkan á oljuprísin. Tá ódnin Gustav herjaði Meksikoflógvan fyri stuttum, bleiv øll olju- og gassframleiðsla steðgað, og sambært AP er hon ikki farin aftur í gongd enn. Tað ringa veðrið tær seinastu vikurnar hevur eisini gjørt, at fleiri oljureinsiverk í Texas hava staðið still, og almenningurin har er ávaraður um, at tað kann henda, at trot verður á benzini teir næstu dagarnar.



*Josef Scheungraber er ákærdur fyri eitt 64 ára gamalt hópdráp (Mynd: AP)*

# 90 ára gamal ákærdur fyri krígsbrotsverk

**Tann 90 ára gamli Josef Scheungraber er ákærdur fyri hópmorð í Italia undir seinna heimsbardaga**

**Í gjár byrjaði rættarmáið ímóti fyrrverandi týska hermanninum Josef Scheungraber, sum er ákærdur fyri at hava havt ábyrgdina , tá 14 fólk vórðu myrd í Italia undir seinna heimsbardaga.**

**Sambært ákæranum stóð tann táverandi loytnanturin á odda fyri einari lítlari herdeild, sum beindi fyri 14 italiumonnum, tá týski herurin tók seg aftur úr Italia í juni í 1944. Millum tey 14 var ein 74 ára gomul kvinna, sum av tilvild kom fram við hermonnunum.**

**Josef Scheungraber noktar seg sekan.**

## STUTT SAGT

## ES stuðlar Georgia

ES hevur gjørt av at Georgia 500 milliónir evrur í hjálp í 2010 til at bøta um skaðan, sum kríggið millum Georgia og Russland í síðsta mánað hevði við sær.

Ein talsmaður hjá ES-nevndini sigur við tíðindastovuna AFP, at pengarnir skulu brúkast til at hjálpa teimum, sum noyddust at flýggja frá húsi og heimi orsakað av bardøgunum í Suðurossetia, og til at endurreisa ymiskt, sum fór í krígnum.

Samstundis sigur ES-nevndin seg vóna, at tey einstøku limalondini í samveldinum fara at veita Georgia hjálp. Talsmaðurin vísti í hesum viðfangi á, at georgiska stjórnin hevur lagt stóran dent á at fáa tættari samband við ES.

## Tað verður helst Livni

Í Ísrael benda meiningakanningar á, at Tzipi Livni, uttanríkisráðharri, fer at vinna formansvalið í flokkinum Kadima í morgin. Verður Tzipi Livni formaður í stjórnarflokkinum, verður hon eisini ísraelskur forsætisráðharri og tann kvinnan í hesum embæti í 30 ár.

Ein annar ráðharri stillar upp ímóti Tzipi Livni. Tað er fyrrverandi herovastin Shaul Mofaz, men sambært teimum seinastu meiningakanningunum er hann 14 prosentstig aftan fyri uttanmríkisráðharran, skrivar AP úr Tel Aviv.



*Tzipi Livni verður helst forsætisráðharri (Mynd: Polfoto)*